## Arbeiðsloysið veksur í OECD

Arbeiðsloysið í OECD-londunum var var 6,8 prosent um ársskiftið. Tað var 0,2 prosentstig meiri enn ein mánað frammanundan og 1,1 prosentstig meiri enn fyri einum ári síðani. OECD sigur, at arbeiðsloysið í Evropa var 8,0 prosent um ársskiftið, og at tað var 0,8 prosentstig meiri enn næstseinasta ársskiftið. Í USA vóru tey tilsvarandi tølini 7,6 prosent og 2,6 prosentstig. Arbeiðsloysið veksur eisini í Japan. Tað var 4,5 prosent á nýggjárinum, og tað var 0,7 prosentstig meiri enn fyri einum ári síðani, sigur OECD.



## Eimskip-felag í gjaldssteðg

Íslendska flutningsfyritøkan Eimskip boðaði í gjár frá, at hon gevst við at reka frystifyritøkuna Daalimpex í Niðurlondum. Sagt verður, at samráðingar hava verið um sølu, men at tær slitnaðu í seinastu løtu. Tí hevur Eimskip gjørt av at lata dóttirfelagið fara í gjaldssteðg. Leiðslan í Eimskip sigur, at avgerðin fær onga ávirkan á virksemið hjá móðurfelagnum. Lagnan hjá Daalimpex ávirkar heldur ikki fíggjarstøðuna hjá Eimskip, tí tapið bleiv avskrivað í fjør.

# Føroyskir listamálarar sum ambassadørar



*Zacharias Heinesen og Bárður Jákupsson, sum báðir hava framsýningar í Keypmannahavn*
*Mynd Jan Müller*



*Øssur Mohr, listamálari her saman við Stanley Samuelsen, tónlistamanni og stjóranum á Skt. Gertrud gallarii í Keypmannhavn*

*Mynd Jan Müller*

**MYNDLIST**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tá tosað verður um føroyskt vinnulív so tengja vit tað næstan altíð saman við fiski. Men vinnulív er so nógv annað eisini. Føroyskir listamenn umboða t.d. eisini ein part av okkara vinnulívi. Og tá hugsað verður um at branda Føroyar, at selja mentan og list av landinum og harvið eisini at fáa fremmandafólk henda vegin, tá eigur okkara myndlist og okkara myndlistafólk ein týðandi um enn lítlan sess á hesi rók. Tað fer Vinnurásin á Rás2 m.a. at viðgera í sendingini týsdagin klokkan 16. Jan Müller hevur vitjað tríggjar føroyskar listamálarar, sum í løtuni sýna fram í Keypmannahavn, allir í hvør sínum gallarríi. Teir eru Øssur Mohr, Zacharias Heinesen og Bárður Jákupsson. Í samrøðunum verður eisini nomið við myndlistina í Føroyum í dag og hvussu hesir tríggir listamálararnir arbeiða og trívast í tí listarliga umhvørvinum.

Vinnurásin verður endursend leygardagar klokkan 14.



Grønlandstíðindi Kári við Stein

# Minni er til av rækjum

*Kári við Stein hevur verið tarnaður av sjúku, men nú hava vit aftur frætt frá honum*

Bæði Lómur og Polar Aassik og Polar Natarnaq hava haft gott fiskarí. Teir eru á Skipasmiðju í Nuuk fyri tíðina, men teir royna á støðum, har tey størru skipini ikki sleppa framat. Lómur var inni í Illulisat við knapt 120 tonsum av góðum rækjum, og Polar Aassik var í Nuuk við um 70 tonsum. Polar Amaroq, Regina C, Natarna, og Polar Natoralik hava verið inni í Nuuk og landað herfyri, og her í Sisimiut hava Qaqqatsiaq og Akamalik verið og landað. Umborð á Akamalik hava teir hava haft filmslið frá sjónvarpsrásini Dicovery umbord. Tann 26. januar kom Ocean Tiger inn at landa. Teir høvdu um 400 tons inni, og Markus hevur landað í Nuuk.

**28. januar**
Í dag kom Lómur inn eftir fleiri kørum. Har var alt fult hjá teimun. Teir skulla byrja at landa í morgin. Teir hava 125 tons inni henda túrin. Síðani Lómur byrjaði at landa 6. januar í ár hava teir fiskað fyri knappar 4 mill. Teir hava roynt uppi við Haruoynna á einum øki, har teir stóru ikki hava loyvi at royna. Polar Amaroq er inni í Nuuk í dag og landar.

Polar Aassik hevur eisini gjørt tað gott hetta tørnið. Teir hava verið inni við hálvari last aftur í Nuuk 29 jan., og teir loystu longu á midnátt til nýggjan túr.

Manu er inni í Manitsoq og landar.

**30. januar**
Lómur loysti í morgun nýggjan til túr. Teir skulla landa mikudagin og skifta yvirmenn. Ocean Tiger kom inn at bunkra og taka pakning, sum lá eftir her. Trolararnir eru víða, og sum eg havi hoyrt, er lítið og onki til av rækjum fyri tíðina. Ísur er eisini forðing hjá teimum. Men januar mánaði plagar heldur ikki at vera ein av teimun góðu mánaðum fyri rækjur.

**1. februar**
Í dag er stilli. Eg hoyrdi í dag, at fimm jollur høvdu skotið nakrar hvíthvalir í gjár. Á veg til hús kollsilgdi ein jolla. Har vóru nokk ongir skottir ella kassar i jolluni, so alt tvøstið og hvøljan fór í annað borðið. Maðurin umborð fekk boðað hinum frá, at hann var við at søkka. Hann kláradi at svimja inn á land. Har stóð hann til hjálpin kom. Maðurin fekk einki mein, men eg havi einki hoyrt um jolluna.

Ein av trolarunum skuldi landa her mánadagin 2. februar. Hetta er útsett, tað er ov lítið fiskað. Steffan C er á veg til Nuuk at landa við fullum skipi um 400 tons. Hann kann eisini royna, har sum Lómur og Polar Qrassiuq kunnu royna inni i kassanun út fyri Kangatsiaq. Frætt er frá Lómi, at teir høvdu gott 50 tons inni seinnapartin. Heldur tað áfram, sum tað hevur gingið, fáa teir nokk uppí til mikudagin, og so fara teir væl upp um 4 mill í januar.